# Diamantbrúdleyp



Hósdagin 19. februar hava hjúnini Aslaug og Danjal av Rana í Trongisvági verið gift í 60 ár.

Aslaug er fødd og uppvaksin í Hvalba og Dánjal er úr Trongisvági. Sum ung arbeiddi Aslaug í handli á Tvøroyri, annars hevur hon verið heimaarbeiðandi húsmóðir. Dánjal er fyrrverandi fakfelagsmaður og býráðslimur, og Aslaug hevur verið honum ein trúgvur stuðul øll hesi mongu ár.

Virkna arbeiðslív sítt byrjaði Dánjal sum unglingi í kolaminunum í Rangabotni. Seinni koyrdi hann gravkýr, m.a. í sambandi við anlegsarbeiði til loranstøðina á eggjunum, SEV útbyggingina í Botni og við Hovsvøtn og tá útbyggingin fyri flakavirkið á Tvøroyri varð gjørd.

Í 1971 gjørdist Dánjal virkin í fakfelagsarbeiði sum nevndarlimur og skrivari í arbeiðsmannafelagnum Fylking á Tvøroyri, har hann var formaður í árunum 82-97. Í 1977 varð hann settur í starv sum stjóri á Løngjaldsstovu Fylkingar, og røkti hann hetta í 20 ár.

Fyrsta fólkavalda starvið fekk Dánjal í 1959, tá hann varð valdur í lækningarnevndina á Tvøroyri. Í hesum virkaði hann til 1980 og var formaður frá 1969.

Dánjal varð fyrstu ferð valdur býráðslimur á Tvøroyri í 77, og røkti hann hetta starvið í samanlagt 24 ár, harav var hann borgarstjóri frá 1985- 1992. Í Froðbiar sóknar javnaðarfelag var Dánjal nevndarlimur í 45 ár, av hesum var hann formaður í 12 ár

Hugsjónarliga og politiskt er Dánjal kendur frá stríðnum fyri sosialum rættvísi. Her var avgjørda hugsan hansara at arbeiðarastættin, bæði beinleiðis og gjøgnum politisku umboðan sína, átti sín lutvísa part í bæði vinnutólum og harav skaptum vinningi. Henda sannføringin sermerkti vinnulívið á Tvøroyri, øll tey árini hann og javnlíkar hansara ráddu fyri borgum. Tá tað privata gavst á fótum, fingu teir, frá vanliga borgaranum, til vega partapening og lótu byggja flakavirki og trolarar, sum øll kreppuárini veittu tvøraborgarum ríkar vinnumøguleikar.

Aslaug og Dánjal hava altíð verið andaliga virkin, og samkoman Salem á Tvøroyri er teirra andaliga heim, har Aslaug eisini var virkin í sunnudagsskúlanum í mong ár.

Aslaug og Dánjal eiga børnini: Petur Karl, sum er bóndi í Trongisvági, Jenis, sum er lækni og løgtingsmaður og býr í Havn, Bjørg, sum er ljósmóðir og býr í Trongisvági, og Varna, sum er økonoma og býr í Saltangará. Ommu- og abbabørnini eru seks í tali.

Dagurin verður hildin í Salem leygardagin 21. februar kl. 18.

*-red*

# Næmingar hittust til 40 ára hald



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er av realskúlanæmingum frá 1951, sum hittust aftur til 40 ára hald á Hotel Føroyum í 1991.

**Aftasta rað f.v.:** Árni Jacobsen, Frants Restorff og Heini Heinesen.

**Miðraðið f.v.:** Poul Olsen, Terji Skýlindal, Alma Brend, Maria Lindberg, Gunna Midjord, Ása Reinert, Marjun Weihe og Marita Arge Magnussen.

**Fremst f.v.:** Jógvan Joensen, Anna Marr, Jonna Jensen, Sanna Simonsen og Tórhild Petersen

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 152)

*Myndaeigari: Marita Arge Magnussen*

## Andlát og jarðarferðir

**Berghild á Steig, Klaksvík**, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum mánadagin 16. februar, 59 ára gomul.

Kistan við **Doretu Jacobsen úr Fuglafirði** fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin 19. februar kl. 18. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju fríggjadagin 20. februar kl. 14.

**Herdis Joensen úr Mykinesi** andaðist týsdagin á Sýnuni í Miðvági 93 ára gomul. Farið verður av Sýnuni fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju leygardagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini.

---

Kunngjørt verður, at góða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Berghild á Steig**
Klaksvík

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum mánadagin 16. februar, 59 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin 21. febr. kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Bogi, Dan, Gunnar og Rannvá**

Tey, ið ynskja at lata blómur ella kransar, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Føroyafelag móti krabbameini.

---

## Tøkk

Eina hjartans tøkk vilja vit siga øllum teimum, sum vístu okkum samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Bergitha Petersen**
vanliga nevnd Gigga
Vestmanna

doyði og varð jarðað.
Túsund takk øll tit, sum bakaðu og á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Takk til prestarnar í kapellinum og í kirkjuni fyri góð og troystarrík orð, og til sangarar og berarar.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til missiónshúsið.
Takk til tykkum á Landssjúkrahúsinum, sum tóku tykkum so væl av henni, tá vit komu suður við henni, og til heimahjálpirnar, sum vóru so góðar við hana.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Meivør og Oddbjørg**